Løgtingið
LM 086/2025

Undirvísingarstýrið

+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

7. januar 2026

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøters gøta 7
100 Tórshavn

Hoyringssvar til uppskot broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt

Í orsakirnar til uppskotinum stendur, at tørvur er á at endurskoða og dagføra dagstovnalógina, ið er frá ár 2000. Undirvísingarstýrið undrast tó á, nú barnaverkætlanin er í gongd og ein barnalóg er ávegis, at uppskot til broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt kemur nú. Tað hevði verið skynsamt, um ein samlaður 'pakki' kom við broytingum á øllum barnaøkinum, tá barnaverkætlanin og barnalógin er liðug, soleiðis at alt barnaøkið verður betri koordinerað, m.a. dagstovnaøkið, fólkaskúlaøkið og sernámsfrøðiliga økið.

Viðvíkjandi ítøkiligu ásetingunum í uppskotinum:

§ 3, stk. 1

Í § 3, stk. 1 verður ásett, at kommunan *kann* geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og hevur ábyrgdina av virkseminum. Í fólkaskúlalógini er ásett í § 47, stk. 1, at kommunustýrið hevur skyldu at skipa so fyri, at íbúgvarar í kommununi hava møguleika at fáa undirvísing og at figging er tøk til hetta. Líknandi áseting átti eisini at verið á dagstovnaøkinum, harvið at kommunan *skal* geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni. Um dagstovnapláss ikki er tøkt, eigur kommunan at skipa fyri plássi í aðrari kommunu.

§ 3, stk. 2

Í § 3, stk. 2 er aldursbýtið fyri ymisku tilboðini nágreinað. Í mun til verandi lóggávu, so kann hetta síggjast gagnligt, so ávísur aldur er ásettur til børnini, ið verða fevnd í dagstovnavirkseminum og harvið av dagstovnalóggávuni. Tó er ávís undran í mun til ásetingarnar. Í fyrstu atløgu, so er ásetingin neyvt orðað, og nágreinar júst hvussu nógvir mánaðir eitt barn skal vera, fyri at fáa bjóðað eitt ávíst námsfrøðiligt tilboð eftir lógini. Hóast hetta stendur í serligu viðmerkingunum, at aldursbýtið "*er vegleiðandi og vísir til, hvat vanliga praksis í dag áleið er*". Sjálv orðingin í lógini leggur tó ikki upp til, at ásetingin er vegleiðandi.

Mett verður ikki, at detaljustýring eigur at verða í einari lóg, vegna at tað verður ov stirvið, um broytingar vera í praksis. Heldur eigur Barna- og útbúgvingarmálaráðið at umhugsa, at áseta slíkar nágreiningar í kunngerð (um mett verður, at tað er neyðugt at hava slíkar nágreiningar). Tað er møguliga ætlanin við ásetingini, at aldursbýtið skal gera skipanina greiðari og forða ivamálum, men mett verður, at nágreiningin/avmarkingin fer at gera skipanina torgreiddari, har nógv undantøk sambært § 3, stk. 3 í uppskotinum skulu gerast.

Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Undirvísingarstýrið kundi hugsað sær at vita, hvat tað ítøkiliga er, sum ger, at ráðið ynskir at aldursbýtið verður nágreinað og hvat tað er, sum ikki riggar við verandi lóg, ið ikki hevur eitt nágreinað aldursbýti?

Næsta undranin er í mun til ásetingina, í §3, stk. 2. nr. 1, har tilskilað er, at dagrøkt og vøggustovuplass eru til børn í aldrinum 6 mánaðir. Í føroyska samfelagnum hevur í longri tíð verið arbeitt fyri, at børn fáa tryggja góðar tilknýtis møguleikar frá føðing við foreldur síni, við barsilstíð hjá foreldrum til barn. Barsilstíðin er komin upp til 48 vikur til eitt barn, alt eftir hvussu vikurnar verða nýttar. Torført er at síggja fyrimunir við orðingini um "6 mðr", tá tað elva kann til paradigmuskifti, so at barsilstíðin fyri sjálv barnið verður stytt. Námsfrøðiliga og sálarfrøðiliga kann hetta ikki undirbyggjast, at barnið byrjar stovnslívið so tíðliga, heldur tvørturímóti. Í mun til barsilsskipanina, so krevst áseting í hesi lóggávu ella aðrari, um leggjast skal uppfyri, at foreldur við hesari broyting í dagstovnalógini í prinsippinum kunnu halda áfram í barsil í longri tíð, ímeðan barni er byrja á dagstovni. Byrjanin til stovnslívið og harvið brotið í fyrstu relatiónunum og í tilknýtið við primeru umsorganarpersónarnar verður fakliga mett, sum sárbært tíðarskeið hjá barninum og at fyrsta menningin skal vera góð, skal hetta hepnast. Tí undrar tað, at hetta verður framskunda. Upptøkureglur til dagstovnaøkið hevur verið umsitið av kommununum, og kundi møgulig undantøk til frávik fyri at byrja stovnslívið, beint fyri ella tá barsilstíðarskeiðið er runnið, verið tilskila av kommununum í upptøkureglum og ikki við orðingini "6 mðr" í lóggávuni. Umframt avleiðingar fyri barnsins fyrstu menning, sum fakliga verður mett at gagna børnum í nærsambondum og ikki á stovni, so kann somuleiðis hugsast at hetta gerast ein meirútreiðsla fyri kommunurnar. Einki er ásett um normering á dagstovnaøkinum í lógaruppskotinum, men vanligt hevur verið og er tað í tráð við fakligu tilmælini, at normeringin er hægri til yngstu børnini. Viðmerkjast kann tí, at byrjar stovnslívið í 6. mðr aldri, so vil tað elva til meir normering og harvið meira útreiðslur, men øllum børnum skal veitast góðar menningarmøguleikar.

Viðvíkjandi barnagarðar sbrt. § 3, stk. 2, nr. 2 í uppskotinum, so skal Undirvísingarstýrið gera vart við, at tað ikki eru allar kommunur (serliga tær lítlu), sum hava barnagarðar, og fíggjarliga er trupult at áleggja teimum tað (umframt trupult at fáa námsfrøðingar til økið). Her eigur kommunan at hava skyldu til at samstarva við aðrar kommunur, so borgarar fáa ein breiðari skara av námsfrøðiligum tilboðum og eru tryggjaðir javnbjóðis atgongd til fakligan stuðul (sum tað stendur undir 'orsakir til lógaruppskotið').

§ 3, stk. 4 - Frítíðarstovnar

Í § 3, stk. 4 er ásett, at frítíðarstovnar eru "*til børn frá forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk*". Undirvísingarstýrið heftir seg við orðingina "í minsta lagi 2. flokk". Hetta kann skapa ójavnt námsfrøðiligt tilboð í ymisku kommununum, tá frítíðarstovnar til børn eldri enn 2. flokk ikki verður skipað meira neyvt.

§ 3b – Ábyrgd

Kommunurnar fáa við ásetingini dagligu námsfrøðiligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av økinum. Landið fær yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina. Tað er ikki greitt, hvussu yvirskipaða ábyrgdin verður útint, hvørji minimumskrøv kommunur skulu lúka, hvussu eftirlit skal fremjast, og hvørjar heimildirnar eru, um kommunurnar ikki liva upp til ábyrgd sína.

§ 3c - Samstarvsnevnd

Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Í verandi lóg er ein áseting um dagstovnaráð, ið við hesum uppskotið verður strikað (§ 2a). Í staðin verður lagt upp til at skipa eina samstarvsnevnd, har ætlanin er, at leggja upp til samstarv millum land og kommunur.

Í serligu viðmerkingunum í uppskotinum stendur, at ásetingin um dagstovnaráð "*varð sett inn í dagstovnalógina við tí endamáli at styrkja samstarvið millum land og kommunur á dagstovnaøkinum. Í ráðnum hava sitið umboð m.a. fyri Kommunufelagið, Mentamálaráðið (nú Barna- og útbúgvingarmálaráðið), Námsvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Pedagogfelag og Javnstøðunevndina. Endamálið við ráðnum hevur verið at ráðgeva og menna fakliga arbeiðið á dagstovnaøkinum. Hendan ráðgevandi skipanin sum hevur virkað umvegis dagstovnaráðið hevur verið eitt týdningarmikið stig móti betri samstarvi, men royndirnar vísa, at skipanin ikki í fullan mun hevur megnað at tryggja tað samskipaða samstarvið, sum ætlað var. Skipanin hevur heldur ikki havt lógarfestar heimildir at taka stig til felags menningarátøk ella at gera bindandi tilmæli. Tí verður við hesi lóg heimildin um Dagstovnaráð strikað, og í staðin verður við nýggjari § 3 c lógarfest ein Samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið, sjá serligu viðmerkingar til § 1 nr. 5*".

Tað tykist sum, at man við uppskotinum einans 'kallar barnið okkurt annað', men at ongin verulig broyting verður í mun til at fara frá einum dagstovnaráði til eina samstarvsnevnd. Avbjóðingarnar, ið høvdu við sær, at dagstovnaráðið ikki eydnaðist, tykjast at verða endurtiknar. Samstarvsnevndin fær við uppskotinum ikki nakran legitimitet, heimildir ella mandat. Sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið nevnir í serligu viðmerkingunum, so var hetta sami trupulleiki, sum man hevði við dagstovnaráðnum.

Um man ynskir hesi broyting, har dagstovnaráðið verður strikað, og ein samstarvsnevnd skipað í staðin, so má orðingin og heimildirnar í uppskotinum styrkjast. Tað má tryggjast, at nevndin fær legitimitet og greiðar heimildir/rættindi, soleiðis tað ikki verður ein symbolsk nevnd, sum onga veruliga ávirkan hevur, og harvið onga broyting hevur við sær í roynd og veru.

Alternativt kundi Barna- og útbúgvingarmálaráðið varðveitt § 2a í verandi dagstovnalóg, og í staðin veitt tær heimildir, sum dagstovnaráðið hevur tørv á, fyri at kunnu fáa tann leiklut og hava tann ávirkan á økið, sum upprunaliga ætlað.

5a, stk. 1 – Námsfrøðilig ráðgeving

Í § 5a er ásett, at kommunurnar sjálvar ella í samstarvi við øðrum kommunum skulu veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar. Undir '*Orsakir til uppskotið'* stendur, at "*Í verandi lóg eru fleiri viðurskifti ógreið. Tað er t.d. ikki nóg greitt, hvussu ábyrgdin verður býtt millum land og kommunur, og tað mangla felags fakligir karmar og greiðar reglur um ráðgeving. Ymiskir fakligir og skipanarligir leistir hjá kommununum hava gjørt, at skipanin í dag er ólík frá stað til stað. Hetta kann í ávísum førum elva til, at tænastur og atgongd til stuðul verða upplivað ymisk av børnum og foreldrum. Nakrar kommunur hava egnu námsfrøðiliga ráðgeving, meðan aðrar keypa tænastu uttanífrá, og hetta hevur ført til ymiskan struktur og tilgongd. Ein felags karmur kann tí styrkja gjøgnumskygni og tryggja meira javnbjóðis atgongd til fakligan stuðul og ráðgeving um landið*".

Mett verður, at uppskotið framvegis hevur við sær eina 'postnummar rættartrygd', harvið at tað verður ójavnt hvørji námsfrøðilig tilboð og ráðgeving børn fáa, tengt at hvørjari kommunu tey búgva í. Talan er t.d. um eina tunga byrðu hjá smærru bygdum/kommunum, hóast møguleiki er fyri samstarv øðrum kommunum. Við uppskotinum tykist tað sum, at ætlanin við uppskotinum er, at kommunur ikki skulu hava møguleika at keypa námsfrøðiligar tænastur uttanifrá, men skulu brúka fakligheitina sum stovnurin hevur (ella sum aðrir dagstovnar hava). Um hetta er ætlanin, so verður tað ymiskt, hvørja fakligheit ymisku kommunurnar kunnu

Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

veita. Tað er ongin loyna, at tað er torført at fáa fakligheit inn á dagstovnarnar, og at mangul er á námsfrøðingum

Ein alternativ orðing kundi verið, at kommunurnar skulu tryggja, at øll námsfrøðilig tilboð hava atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving.

§ 5a, stk. 2 - Sernámsfrøðilig ráðgeving

Í § 5a, stk. 2 er ásett, at landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv. Sum nú er, er heimildin hjá Sernám at virka á dagstovnaøkinum, ásett í fólkaskúlalógini, har tað stendur í § 4, stk. 6, at "*Landsstýrismaðurin kann* [okkara herðing] *veita børnum, ið enn ikki hava byrjað skúlagongdina, sernámsfrøðiligan stuðul. Somuleiðis verður sernámsfrøðilig ráðgeving veitt foreldrum og øðrum, ið varða av hesum børnum*". Hetta broytir tí grundleggjandi á fortreytunum hjá Sernámi, harvið at tað verður ein skylda hjá Sernámi at veita ráðgeving.

Eins og víst verður á í aðrari viðmerking, undrar tað Undirvísingarstýrið, at áseting og viðmerking sum henda kemur inn nú, tá ið barnalóg er ávegis og við henni møguliga heilt øðrvísi námsfrøðilig og sernámsfrøðilig tilgongd. Eisini hevur landsstýrismaðurin í fráboðan "Broytingar á sernámsfrøðiliga økinum" dagfest 1. september 2025 m.a. orðað:

> *"Næsta stigið í stragtegisku tilgongdini er saman við umboðum fyri skúlaleiðslur, førleikastovur, dagstovnar, o.s. at verða við til at samskapa nýggjar loysnir fyri, hvussu virksemið kann verða lagt til rættis, soleiðis at ein so góð tænasta sum møguligt kann verða veitt børnum og ungum á sernámsfrøðiliga økinum.*
>
> *Aðrir samstarvspartar verða eisini við í tilgongdini, sum kemur at verða skipað innan karmarnar av Barnaverkætlanini, sum leggur tilgongdina til rættis. Tað snýr seg um knýtið til Heilsuverkið, Almannaverkið, Barnaverndarøkið, Gigni, v.m. Málið við Barnaverkætlanini er at seta barnið í fremstu rað, tá ið tænastur verða veittur frá ymsu pørtunum og at virka í felag fyri, at tænasturnar verða sameindar og samskipaðar, fyri at røkka einum so góðum úrsliti sum møguligt."*

Júst hvussu Sernám framyvir verður skipað er tíðskil ógreitt, og áseting sum henda í dagstovnalógini tykist bindandi og avmarkandi fyri ætlanirnar, nevndar omanfyri. Ætlanir, sum verða umrøddar og væntandi framdar í sama aðalráði, sum eisini endurskoðar og broytir dagstovnalógina.

Endamálsorðingin í verandi lóg

Tað er við uppskotinum ikki lagt upp til broyting í endamálsorðingini í lógaruppskotinum. Undirvísingarstýrið heldur tað vera undranarvert, at dagstovnalógin ikki hevur ásetingar um m.a. føroyska málið, samskifti og málmenning í endamálsorðingini. Tað sæst, at enska málið tekur seg fram millum føroysk børn í øllum aldri. Tí er týdningarmikið, at verja og styrkja føroyska málið. Harumframt vísir gransking á, at børn læra mál best umleið í aldrinum 0-6 ár.

Eisini er tað ein sannroynd, at tað eru nógvir tilflytarar, og tað er týdningarmikið, at børn (serliga børn undir skúlaaldur), verða loftaði og ment málsliga, og at dentur t.d. eisini verður lagdur á inklusión í endamálsorðinigini.

Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sagt verður um kostnaðin fyri kommunurnar viðvíkjandi námsfrøðiligu ráðgevingini: *"Tí er trupult at meta heilt neyvt um kostnaðaravleiðingarnar á hesum stigi, og nærri metingar mugu gerast í stamstarvi við kommunurnar, sum hava besta innlitið í veruliga raksturin".*

Tað tykist løgið, at eingin útrokning skal fyriliggja, ella at eitt hugsað modell verður lagt fram, hvussu uppskotsstillarin sær fyri sær, at økið kann verða skipað, og hvør fíggjarliga avleiðingin av tí er. Rætt er, at endalig fíggjarlig meting kann vera trupul at áseta, og hon valdast hvør skipanin verður kommunu fyri kommunu. Men als onga fíggjarliga meting at hava og einki modell at vísa á, tykist avmarkað og letur upp fyri óavmarkaðum møguleikum og harvið fjølbroytni, sum gongur ímóti tankanum um javnbjóðis tænastu fyri øll børn.

Til samanberingar kann nevnast, at førleikastovurnar í fólkaskúlanum fevna um áleið 18 ársverk. Her er talan um ymisk fakøki so sum lesivegleiðing, orðblindni, o.a., men hetta gevur tó eina hóming av, hvussu umfatandi ein javnbjóðis og væl virkandi námsfrøðilig ráðgeving má vera. Og havast skal í huga, at førleikastovurnar í fólkaskúlanum virka inn í eitt fakliga væl dekkað øki við útbúnum lærarum. Tað er ikki støðan á dagstovnaøkinum, og tískil má væntast, at námsfrøðilig ráðgeving fer at fevna vítt og til alt frá ófaklærdum til serliga faklærd.

Sum eyka útreiðsla fyri landið verður bara víst til Nám og tær uppgávur, sum í framtíðini koma at liggja har. Undirvísingarstýrið ivast í, hvussu rætt tað er, at nevna ávísan stovn til júst hesa uppgávuna, men heldur eyðmerkja hana og gera fíggjarliga meting av henni.

Sum víst er á áður, er Sernám bara nevnt í fólkaskúlalógini § 4, stk. 6 og er orðingin avmarkað við *kann veita børnum*. Við broytingini í dagstovnalógini §5a stk. 2 og 3 verður sernámsfrøðiliga uppgávan staðfest og í viðmerkingunum verður sagt, at talan er um Sernám. Og víðari verður sagt, at nýggja orðingin ikki hevur nakra fíggjarliga avleiðing við sær fyri Sernám ella landið. Undirvísingarstýrið tekur ikki undir við hesi niðurstøðuni, tí ásetingin verður munandi meira bindandi og staðfest, og avmarkaða virksemið, sum Sernám í dag kann loyva sær á økinum við avmarkaðu *kann* orðingini í fólkaskúlalógini verður munandi herd, og tískil kann væntast munandi størri virksemi fyri Sernám ella aðra skipan undir landinum, enn sum nú er.

Samanumtøka

Samanumtikið tykist tað ikki sum, at talan ikki er um eina endurskoðan og dagføring av dagstovnalógini í sínari heild, men endurskoðan og dagføring av ávísum ásetingum. Tað tykist ikki sum, at flestu broytingarnar hava nakran praktiskan týdning ella broyting við sær. Sum nevnt, so er barnaverkætlanin í gongd og ein barnalóg ávegis umframt at ein víðfevnd endurskoðan av øllum sernámsfrøðiliga økinum er sett ígongd.

Mett verður, at ráðið eigur at endurskoða og dagføra lógina í sínari heild, og bíða við at leggja hetta lógaruppskot fram, inntil man kann koma við einari loysn, ið sampakkar og er koordinerað við restina av barnaøkinum.